Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

fyrispurning frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. S-55/2019, viðvíkjandi GPS-tænastum frá Umhvørvisstovuni til vinnuligt virksemi.

Spurningurin var soljóðandi:

1. *Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hví prísstøðið á landsumfatandi GPS tænastum, sum m.a. byggivinnan brúkar í sínum virksemi, verður so høgt, sum boðað er frá av Umhvørvisstovuni?*
2. *Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað við høgu gjøldini?*

Svar:

Til spurning 1
Umhvørvisstovan hevur í tíðarskeiðinum 2016-2019 uppsett 4 GPS-basustøðir á 4 ymiskum plássum, so støðirnar landafrøðiliga røkka um alt landið. Støðirnar eru í Klaksvík, Vestmanna, Tórshavn og í Trongisvági.

Tað serliga við hesum nýggju GPS-tólunum er, at til ber at senda gps-korrektiónir til GPS-mátarar gjøgnum internetið. Við nútímans mátiútgerð røkkur neyvleikin í landafrøðiligum mátingum nú niður í 2 cm í største partinum av landinum.

GPS-basustøðirnar eru fyrst og fremst settar upp fyri at økja neyvleikan í allari landmáting hjá Umhvørvisstovuni sum almennum landmátingar- og kortmyndugleika. Í øðrum lagi fyri at Umhvørvisstovan við sínum mátingum kann luttaka í altjóða landafrøðiligum kanningarsamstarvi, har eitt nú útrokningar verða gjørdar av, hvussu Føroyar førka seg og hvønn veg hellið á oyggjunum broytist. Í triðja lagi – sum avleidd tænasta - kunnu nýggju hentleikarnir eisini brúkast av øðrum, sum hava áhuga í neyvum landmátingum.

Umhvørvisstovan hevur ikki boðið tænastuna út alment enn. Kunningin um nýggju tøkniligu hentleikarnar er gingin munn av munni í vinnuni og síðani hava áhugaðir brúkarar, eftir umbøn, fingið útflýggjað brúkaranavn og loyniorð frá Umhvørvisstovuni til at binda seg í GPS-skipanina. Somu brúkarar hava eisini fingið ein teldupost frá Umhvørvisstovuni við kunnleika um, at talan er um eina ókeypis royndartíð og at tað væntandi fer at kosta 1000 kr/mð (+mvg) fyri hvørt tól, óansæð um talan er um annað alment, kommunalt ella privat virksemi.

Nú ein ávísur áhugi og tørvur er staðfestur, umhugsar Umhvørvisstovan at bjóða GPS-tænasturnar út alment og fyri ein ávísan kostnað. Heimild er fyri hesum í § 12 í kongligu fyriskipanini um *Stedbestemt Information*. Ein kostnað, sum skal dekka ein part av almenna kostnaðinum fyri viðlíkahald, rakstur og regluliga endurnýggjan av tólum, so hvørt tey gerast ov gomul. Fyribils er mett, at ein mánaðarligur kostnaður á 1.000 kr. pr. brúkara pr. mánað, er eitt hóskandi prísstøði, eisini í mun til, hvat onnur kunnu bjóða slíkar tænastur fyri. Ein brúkari, t.d. eitt virki við einari gravimaskinu, skal so í mesta lagi gjalda 12.000 kr. árliga. Eru 3 maskinur, verður kostnaðurin

36.000 kr. árliga. Tá sleppa hesar fyritøkur undan at gera íløgur í egnar GPS-basustøðir og viðlíkahald. Viðmerkjast skal tó, at enn er onki ítøkiligt prísuppskot orðað og heldur ikki viðskiftatreytirnar.

Sum nevnt omanfyri, so eru nevndu GPS-basustøðir ikki settur upp við tí endamáli at veita øðrum almennum stovnum, kommunum ella privatu vinnuni ókeypis ella kappingaravlagandi GPS-tænastur. Talan er heldur um avleiddar tænastur, sum kunnu bjóðast øðrum fyri kappingarføran prís, um ynski er um tað.

Til seinna spurningin er at siga, at landsstýrismaðurin ikki fer at leggja seg út í málið, fyrr enn eitt ítøkiligt útspæl er komið frá Umhvørvisstovuni um prísstøði og viðskiftatreytir. Roknað verður við, at Umhvørvisstovan ger eitt uppskot til kunngerð um prís fyri GPS-korrigerandi tænastur við heimild í § 12 í kongligu fyriskipanini um *Stedbestemt Information*, sum verður send viðkomandi áhugapørtum til hoyringar, áðrenn gjald verður ásett. Tástani kann landsstýrismaðurin taka støðu til møguligt prísstøði og viðskiftatreytir.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 4. mars 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður